# – Vit fara eftir tí eina sessinum

**Javnaðarflokkurin fer til val við tí fyri eyga at fáa umboð valt. – Neyðugt er at hava eina greiða føroyska rødd á Fólkatingi, sigur Jóannis Eidesgaard, løgmaður. Hann hevði eitt kanón-val fyri fýra árum síðani, men tað var tó ikki nóg mikið til ein fólkatingssess**

FÓLKATINGSVAL ’05
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*Jóannes Eidesgaard fekk 3.689 atkvøður fyri fýra árum síðani. Hetta var tó ikki nóg mikið til at verða valdur. Hesaferð eru hann og flokkurin til reiðar og fara at gera alt fyri at endurvinna flokkinum annað umboðið*

– Vit vóru so tætt við at fáa mannin við seinasta val. Hesaferð skal eingin ivi verða um úrslitið: Vit vilja og ynskja tí at annað umboðið verður úr Javnaðarflokkinum. Og tað fara vit at gera alt fyri at røkka.

– Men tað setur so krøv til okkum, – at vit enn einaferð gera eitt grundigt arbeiði í valstríðnum, og fáa sagt veljaranum frá, hví tey júst skulu velja okkara flokk, sigur løgmaður.

Enn er listin hjá Javnaðarflokkinum ikki klárur. Men arbeiðið er í gongd, og tá komið er fram móti vikuskiftinum verður kunngjørt hvørji valevnini verða.

Ein av tingmonnum floksins, John Johannesen hevur longu verið frammi og sagt frá, at hann ynskti at stilla upp til Fólkatingið. Og í Sosialinum í gjár segði Katrin Dahl Jacobsen so mikið, at flokkurin í øllum førum stillar upp. Óhugsandi er ikki, at hon sjálv verður at finna á listanum.

Við valið í 2001 vantaði flokkinum slakar 400 atkvøður í at fáa annað umboðið. Sjálvur hevði Jóannis Eidesgaard tá eitt sera gott persónligt val og fekk 3.689 atkvøður. Men tað var kortini ikki nóg mikið til ein sess á Fólkatingi.

Hetta valið kann eisini verða eitt slag av meiningarkanning um støðuna og styrkina hjá verandi samgongu herheima. Men úrslitið kann eisini koma at hava ávirkan á, hvør verður forsætisráðharri eftir valið, tí tann føroyska røddin hevur onkutíð verið tungan á vágskálini á Fólkatingi.

### Føroysk sjónarmið hoyrast

Jóannes Eidesgaard sigur, at sum siður er, fer Javnaðarflokkurin at leggja dent á viðurskiftini millum Føroyar og Danmark í valstríðnum.

Onnur evni kunnu sjálvandi eisini verða tikin fram, tí andstøðan fer uttan iva at venda tosið inn á tey heimligu viðurskiftini eisini.

– Men vit eru í øllum førum til reiðar til valstríðið, sigur hann.

Nógv áhugaverd ting hava verið – og eru – frammi í viðurskiftunum landanna millum. Og her er neyðugt at ein greið rødd verður at hoyra, sum síðiliga kann bera fram tey føroysku sjónarmiðini.

Flokkurin ynskir tí, at alt samskifti og allar samráðingarnar við danir um t.d. fullveldistilgongdina skulu ganga fyri seg í einum góðum og realpolitiskum tóna.

– Ger ein ikki hetta, so verður úrslitið soltið fyri okkum, sigur løgmaður.

### Avtalur klárar

Í løtuni eru nógv viðurskifti frammi í samráðingunum millum Føroyar og Danmark. Millum hesi málini eru tær nógv umtalaðu yvirtøkulógirnar og ikki minst tær uttanríkispolitisku heimildirnar.

Umframt hesar lógir so er ein eisini komin fram til tvær avtalur, sum fara at verða til gagns fyri føroyingar í framtíðini. Tann eina avtalan er um sendistovur og sendimenn, meðan tann seinna fer at geva okkum betri innlit í tey stórpolitisku málini.

Henda seinna avtalan gevur okkum møguleika at fáa størri kunnleika og ávirkan, tá talan er um eitt nú verjumál og uttanríkismál við serstøkum áhuga fyri føroyingar innan t.d. virksemið í NATO og ST.

– Fáa vit eina føroyska javnaðarrødd á Fólkating, so kann hon, eisini her, vera við til at tæna okkara áhugamálum heima og úti, sigur Jóannes Eidesgaard.

# - Sterkur listi skal geva okkum mannin aftur

**Fólkaflokkurin er enn ikki liðugur við listan. Men hesaferð verður talan um ein sera sterkan lista**

FÓLKATINGSVAL ’05
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

Við seinasta val vantaðu meiri enn 700 atkvøður í hjá Fólkaflokkinum at fáa Óla Breckman afturvaldan til Fólkatingið. Hann misti sostatt sessin, hann hevði havt síðani 1984.

Hóast langt var upp til næsta flokk í 2001, so hevur hetta als ikki tikið mótið frá Fólkafloksfólki í 2005. Heldur hinvegin.

– Vit stilla sjálvandi upp hesaferð eisini, sigur Anfinn Kallsberg. Og vit vænta eisini, at fáa mannin aftur.

Hvussu hetta skal gerast hevur Anfinn eisini eina stutta og greiða uppskrift uppá.

Hon er í tveimum punktum:

– Vit skulu stilla ein sterkan listan upp. Og síðani skulu vit siga fólki frá, hvussu góðir vit eru.

– Á henda hátt verður annað umboðið eitt fólkafloksumboð tann 8. februar, sigur hann.

Listin er ikki klárur enn, men verður tað ein av nærmastu døgunum.

# Var ikki brot á sáttmálan

**Mánadagin fall avgerðin í málinum millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið um lønina hjá sjúkum dagrøktarum**

GERÐARRÆTTUR
*Snorri Brend*

Í útskurðinum verður Kommunala Arbeiðsgevarafelagið frífunnið fyri ákærurnar um sáttmálabrot mótvegis Starvsmannafelagnum.

Tað var Starvsmannafelagið sum stevndi hinum felagnum fyri at hava brotið sáttmálan um rættin hjá dagrøktarum til at fáa løn ella ikki undir sjúku.

Í desember mánaði var so dómsviðgerðin í málinum, og í vikuni fall so dómurin í hesum gerðarættarmálinum. Kommunala Arbeiðsgevarafelagið hevur hildið uppá, at tær ikki áttu rætt til at fáa løn útgoldna undir sjúku. Víst varð á, at tað var eitt mistak sum førdi til, at teirra rættindi í hesum spurningi kom við í sáttmálan, vísti Kommunala Arbeiðsgevarafelagið á.

Og nú hevur so rætturin talað felagnum til fyrimuns.

**sb.**

## Vit skulu lata meiri í menningarhjálp

**Fulltrúi skal nú setast at at samskipa føroyska menningararbeiðið**

MENNINGARHJÁLP
*Snorri Brend*

Føroyingar hava altíð verið sera dugnaligir at lata pening til ymisk vælgerandi endamál úti í heimi. Her er talan bæði um pening til hjálpararbeiði, menningararbeiði og til missiónsarbeiði.

Nú er ætlanin frá landsstýrisins síðu at fáa hesi viðurskiftini skipaði við m.a. at gera mannagongdin og langtíðarætlanir á økinum.

Sum skilst av Løgmansskrivstovuni so er ætlanin at Føroyar skulu fáa ein virknari leiklut viðvíkjandi hjálp til menningarlond. Samstundis er ætlanin, at vit skulu lata enn meiri pening til hesi endamálini.

Til tess at samskipa hetta arbeiði skal í næstum setast ein fulltrúi at taka sær av øllum tí føroyska menningarpolitikkinum. Hetta er kortini bara eitt fyribilsstarv, men møguleiki er fyri at hetta kann halda fram eisini í framtíðini.

### Niðursett tíð

Starvsøkið hjá hesum nýggja fulltrúanum í menningarmálum er stutt sagt at samskipa føroyska menningarpolitikkin. Undir hesum kemur so eisini sjálv menningarhjálpin.

Uppgávurnar verða at gera eina langtíðarætlan fyri ta føroysku menningarhjálpina, og at skipa mannagongdir í samband við nýtslu av játtanum til menningarhjálp. Viðkomandi skal eisini virka sum liður millum tað almenna og tað privata í felags átøkum í menningararbeiðinum.

Eitt annað, og ikki minni áhugavert arbeiði er at standa fyri samskiftinum við myndugleikar í avvarðandi menningarlondum og við teir altjóða felagsskapirnar, ið virka á økinum.

Til tess at røkja hesar týðandi uppgávurnar verður sóknast eftir einum fólki við eini viðkomandi útbúgving frá hægri lærustovni innan samfelagsvísindi. Upplýst verður, at umsøkjararnir skulu vera stinnir í føroyskum og enskum máli, og at kunnleiki til spanskt er ein fyrimunur.

Starvið er ikki fulla tíð, men 3/4 tíð, og er fyribils avmarkað hetta árið út. Men lagt verður kortini upp til, at starvið verður umskipað til fulltíðarstarv og starvstíðin longd eisini komandi ár.

Freistin at søkja hetta starvið er úti 3. februar.